


**Nr. 11** *24. mai 2026* **86. árg.**

# Varð ávarað nóg álvarsliga?

Nøkur ár herfyri var ein bólkur av donskum ferðafólki í vetrarfrí í Noregi. Tey búðu á einum háfjalshotelli í einum ómetaliga vøkrum landslagi. Útferðir vóru fingnar í lag, skíðirnar tiknar fram, og henda reina fjallaluftin hevði eina undursama ávirkan. Alt tóktist fara at eydnast so væl.

Teir síðstu dagarnar hevði kavin dungað niður. Fleiri gjáir vóru fyltar, so alt lá sum eitt hav av nýlagstum kava. Ein dagin ætlaðu ferðafólkini sær einsamøll út, tey vildu uppliva norsku náttúruna einsamøll.

Tey norsku hotellfólkini ávaraðu móti teimum vandamiklu, djúpu gjáunum, har tað ikki svitaðist, at tey vildu detta niður ígjøgnum, sláa seg til deyðis móti tí hvassa fjallagrótinum og so at enda – steðga niðri á botni.

Ferðafólkini fóru, men tá ið tey ikki komu aftur til ásettu tíð, vórðu menn sendir út at leita eftir teimum. Tey vóru heilt horvin, og ikki fyrr enn langt aftaná funnu teir tey øll deyð niðri í einum gjáarbotni.

Hesin skaðatilburður vakti miklan ans, og spurt varð, um tey vórðu ávarað. Svarað varð, at tað vóru tey, og at tey vóru farin avstað og skuldu taka ábyrgdina sjálv. – Aftur varð spurt: „Varð ávarað nóg álvarsliga?“

Hetta fær okkum at hugsa, um vit ávara menniskju nóg álvarsliga, tá tað ræður um teirra ódeyðiligu sál.

Í fyrstu Sámuelsbók lesa vit um, hvussu presturin Eli nokk ávaraði synir sínar móti syndum teirra bæði móti Gudi og menniskjum, men Harrin góðtók tað ikki – tað var ikki nóg

álvarsliga. Tí álegði Harrin tí unga Sámueli at siga við Eli: „Eg skal døma hús hansara til ævigar tíðir aftur fyri ta misgerð, at hann visti, at synir hansara drógu bann oman yvir seg og kortini ikki av álvara setti at teimum.“ 1.Sám. 3,13.

Mátti hetta lært okkum at ansa gjølla eftir okkara egnu viðurskiftum við Gud og av álvara ávara onnur móti synd og ævigari glatan.

*Effie Campbell týddi.*

# Orginalur – kopi

*„Eg tær lovi, tí á undurfullan hátt eg varð skaptur.“*
*Sálm 139,14.*

Vit vita øll, hvat ið ein kopimaskina er. Tú leggur eitt skrivað ark í maskinuna. Hetta kallast ein orginalur. Síðani setir tú maskinuna í gongd. So koma t.d. 10 ørk útaftur. Tey eru øll eins, fullkomiliga líka. Tey kallast kopiir.

Tað var Søren Kierkegaard, sum segði, at øll menniskju koma inn í hesa verð sum orginalar; men tá ið tey doyggja, fara tey flestu í grøvina sum kopiir.

Gud hevur skapt okkum í mynd síni. Hann skapti okkum ein og ein, og so legði hann ymsar talentir niður í hvønn einstakan. Vit eru øll ymisk. Ikki ein okkara er líka, vit eru orginalar.

Talentirnar, sum Gud hevur lagt niður í okkum, skulu vit brúka. Eg eri eg, og eg skal tora at liva lívið fult út við teimum talentunum, Gud hevur givið mær. Brúki eg ikki hesar talentir, tí eg óttist fyri, hvat ið hann ella hon halda ella siga, ja, so liggur tann gerningurin ógjørdur, tí eingin er skaptur akkurát sum eg og dugir at gera tingini, sum eg geri tey. Tað er bara eitt av tí slagnum, kopiir finnast ikki.

Hví eru vit so bangin fyri at brúka talentirnar – evnini – fult út til Guds æru. Tað er tí, at jantelógin ræður í hesum heimi, lógin, sum sigur, at tú endiliga ikki mást halda teg vera nakað.

Jú, trúgvandi menniskju eru nakað! Tey eru Guds børn! Tey eru kongsbørn! Tey eru himmalsins arvingar!

Far tí til verka og nýt talentirnar, Gud hevur lagt niður í teg, til hansara æru. Eingin kann gera akkurát tað, tú kanst. Lít ikki til viks og kopiera hini. Gud hevur skapt teg sum ein orginal.

*Effie Campbell.*

# Ein løgin maskina

Um vit menniskju sjálv skuldu gjørt kropp okkara og skrúvað og sett hann saman tøkniliga sum eina aðra maskinu, so høvdu vit hávirt hann. Eitt hjarta slær 70 ferðirnar í minuttin, tað vil siga 100.000 ferðirnar um døgnið, og knappar tvær milliardir í 50 ár, og tað uttan at skula bøtast. Henda maskinan vigar 300 gramm.

Tvær milliónir sveittapoknur í húðini ansa eftir, at likamshitin støðugt er 37 stig celsius. Nervarnir bera tríggjar ferðir so skjótt at, sum eitt snartok. Teir 5 litrarnir av blóði, sum eru í okkum, innihalda 25 billiónir reyð blóðlikam og 34 milliardir hvít blóðlikam.

Men tað halda vit vera eina sjálvfylgju og undrast ikki, av tí at vit eru ikki egna verk okkara. Vit eru nevniliga Guds skaparverk!

Tí kann ein menniskja eydnast og gerast tað ófatiliga stóra: Guds barn, Guds vinur, Guds medarbeiðari.

Og ein menniskja kann miseydnast og gerast eitt illmenni. Av øllum skapningum eru vit tey einastu, sum kunnu gerast tað mótsetta av tí, vit eru ætlað til. Ein livandi revur er og verður ein revur. Hann kann ikki verða eitt illmenni av einum revi.

Menniskja er ein skapningur, sum á aðrari síðuni líkist djórunum og plantunum. Vit kunnu altso følna og doyggja, rotna og venda aftur til moldina, men um vit hyggja at hinari síðuni, so eru vit skapt í Guds mynd, so vit skulu líkjast honum og liva ævigt hjá honum.

Ein maskina! Ja, gjørd úr 66% av vatni – 10,5% av feitti – 16,8% av eggjahvítaevni – 1,1% av kolvætu – 5,6% av ósku – um hetta tilfarið skal virðismetast, hevði tað kostað umleið 20 kr. Men Gud elskar okkum og hevur blást sín lívsanda inn í okkum.

***Hvør dugir at fata tað?*** Og fyri at vit ikki skulu gerast illmenni, sendi Gud okkum hann, sum Pilatus førdi fram píndan og dømdan við orðunum: „Sí, her er maðurin." Tað er í honum, vit síggja, hvat ið Gud hevur hugsað sær við okkum. Tað er eisini bara við honum, Jesusi, at vit verða tað, sum Gud hevur hugsað sær.

*„Kirkeklokken"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Kraftin í Guds orði

*„Kasta breyð títt út á vatnið, tí at langa tíð eftir skalt tú finna tað aftur.“ Præd.11,1.*

Ein trúboðari greiðir frá: „Eg varð biðin at fara til eitt hotell í Nottingham at vitja konu hotellstjórans, sum lá fyri deyðanum. Eg fann hana lukkuliga í trúnni á Frelsara sín, og eg spurdi hana, hvussu hon hevði funnið frelsuvegin.“

„Tá ið eg las hetta,“ svaraði hon og rætti mær eitt tíðindablað.

Eg hugdi at tí og sá, at tað vóru nakrar síður úr einum norðuramerikanskum blaði, har ein partur av einari talu hjá Spurgeon stóð í. Tað var hesin partur, sum var amboðið til nýggju trúgv hennara.

„Hvaðani hevur tú fingið hetta blaðið?“ spurdi eg.

„Tað var ballað rundan um ein pakka, sum eg fekk sendandi úr Avstralia,“ svaraði hon.

Hugsa tær – ein prædika verður hildin í London, ein partur av henni verður sendur til Amerika og prentaður har, síðani verður blaðið sent til Avstralia, og ein partur av tí verður brúktur at balla um ein pakka til Onglands. Og aftan á alla hesa longu ferðina verður tað til ein frelsandi boðskap fyri hesa kvinnu.

Mátti hetta verið ein áheitan á okkum at sáa Guds orð, tí enn er tað galdandi sum áður: Guds orð er sáðið, sum førir til frelsu.

*„Kirkeklokken“. – Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---



## SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum eina gleðiliga hvítusunnu***



### SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 24. mai | **Tekstur:** | Áps. 2,1-18 og Jóhs. 14,26-27 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 14,26b |
| 31. mai | **Tekstur:** | Dán. 6, 1-25 | **Bíbliuorð:** | Dán. 6,27b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 12** *7. juni 2026* **86. árg.**

# Jesus er Guds sonur

Ein gomul kona segði mær, at hon hevði havt vitjan. Gesturin var ein yngri kona, sum øll síni vaksnu ár hevði búð í útlondum. Tær prátaðu saman, og hin eldra konan helt seg skilja, at tað stóð ikki so væl til andaliga við hinari. Hon spurdi hana so: „Trýrt tú á Gud?“

„Tað eru so nógvir gudar til,“ físti hin. „Nei,“ svaraði hin gamla, „tað er bara ein Gud, men nógvir avgudar.“

„Íðan, trýrt tú so ikki, at tað eru stjørnurnar, sum stýra lívi okkara?“ spyr hin yngra.

„Nei, sjálvandi ikki. Vit skulu seta okkara álit á Skaparan og ikki á skaparaverkið. Stjørnurnar eru skaptar tað sama sum tú og eg, og tær kunnu einki gera.“

So var kvirt eina løtu. So sigur hin yngra: „Heldur tú ikki, at Jósef var pápi Jesusar?“

„Nei, tað haldi eg sjálvandi ikki,“ svaraði hin gamla, „og eg kann gott siga tær, hví eg ikki haldi tað. **Fyri tað fyrsta** stendur tað, at tað kendist á henni, áðrenn tey komu saman, at hon var við barn.

**Fyri tað næsta** ætlaði Jósef at sleppa sær av við hana, alt av somu grund. Men eingil Harrans sýndi seg fyri honum í dreymi og segði honum, hvussu alt hetta var hent.

**Fyri tað triðja** stendur tað, at Jósef kom henni ikki nær, fyrr enn hon hevði átt sonin. Øll hesi trý skriftbrotini vísa, at Jósef kundi ikki vera pápi hansara.

Harafturat skal eg siga tær, at frá tí at Jesus stóð fyri ráðnum, og til hann reis uppaftur, gingu 30 profetiir í Gamla Testamenti út við honum. Hetta vísir okkum, at hann var hin lovaði Messias, sonur Guds.“

Skulu vit hava slíkan vísdóm, sum henda konan hevði, at svara fólkið aftur, so krevur tað, at vit geva okkum stundir at lesa í Guds orði og aftaná í **kvirru** hugsa og grunda um tað. Men tað tykist sum Maria við Jesu føtur er eitt útdeytt fólkaslag. Og tað er stórt spell, tí Guds orð er hitt livandi vatnið, sum sløkkir tostan í sál okkara. Í Sálmi 119 – tí longsta av Dávids Sálmum – vers 11 lesa vit: „Eg orð tíni goymi í mínum hjarta, fyri at eg ikki skal synda ímóti tær.“ Hetta er uppskriftin at standa ímóti syndini. So latið okkum fylla okkum við Guds orði.

*Effie Campbell.*

# Hygg

*„Men vit allir, sum við óskýldum andliti avspegla dýrd Harrans, vit verða ummyndaðir til hina somu mynd frá dýrdleika til dýrdleika, við tað at tað kemur frá harra andans.“ 2. Kor. 3,18.*

- Tá ið Dávid **hugdi** upp á Batsebu, fall hann í synd.
- Tá ið Pætur **hugdi** niður á vatnið, var hann um at søkka.
- Tá ið Pætur **hugdi** at gentuni í garðinum hjá høvuðsprestinum, svór hann tríggjar ferðir uppá, at hann ikki kendi Jesus.
- Tá ið Elia **hugdi** upp á Jesabel, flýggjaði hann út í oyðimørkina.
- Tá ið Eva **hugdi** upp á træið, sá hon, at fruktin var góð, hon át og fall í synd.
- Sum tað er ræðuligt at **hyggja** skeivan veg!
- Sum tað er undurfult at **hyggja** rættan veg!

Job var klókur: „Eg gjørdi sáttmála við eygu míni, at eg skuldi ikki **hyggja** at ungmoyggj.“ Job 31,1

„Tey **hugdu** upp til Hansara – og lýstu av gleði, og andlit teirra rodnaðu aldri av skomm.“ Sálm. 34,6 V.D.

„Men tá ið teir **hugdu** upp, **sóu** teir ongan uttan Jesus einsamallan.“ Matt. 17,8.

Loyndarmálið viðvíkjandi trygdini um frelsu og syndafyrigeving – **er at hyggja. At hyggja** upp á Jesus, sum varð sendur av Gudi til jarðar at bera alla synd heimsins.

*Effie Campbell* umsetti.

# Tað gróðursetta orðið.

*„... orðið, sum er gróðursett í tykkum.“ Ják. 1,21.*

Tað ræður um at hoyra og lesa Guds orð soleiðis, at orðið verður gróðursett í hjartanum. Har inni skal orðsins træ hava loyvi at standa og bera fruktir fyri Gud. At lata orðið fáa ræði á sinninum og tonkunum, so at tey heilt verða vegleidd og rættleidd av orðinum, tað er tað, vit kalla fyri umvending.

Royn nú, um tú í dag kanst lata Guds orð fáa loyvi at festa sínar røtur inni í tær – tak tað við út í gerandisdagin, og tá ið tú stendur har úti og møtir teimum mongu smærri og størri trupulleikunum og skalt taka støðu til hetta og hatta, lat so hitt gróðursetta orðið vegleiða teg at gera hitt rætta.

Hann, sum av sonnum letur orðið gróðurseta í hjartanum, fer at bera vakrar fruktir, tað svitast ikki – tað vil siga, tað er ikki hann sjálvur, sum ber hesar fruktirnar; men tað er hitt gróðursetta orðið, sum ger tað. So verður alt sjálvrós útistongt, og eftir verður bara ein lovprísan av tí livandi Guds orðinum, sum skapar tað, ið tað nevnir.

*Ejnar Fledelius, prestur. – Effie Campbell* umsetti.

# Smápengin hjá einkjuni

Ein múgvandi kona varð biðin at lata pening til eitt vælgerandi endamál.

„Tað vil eg fegin,“ svaraði hon, „men tygum mugu vera nøgdur við smápengan hjá einkjuni.“

„Tað er alt ov mikið,“ ljóðaði svarið, „tað kunnu vit ikki taka ímóti.“

„Alt ov mikið?“ segði konan. „Tygum mugu hava misskilt meg. Nú í seinastuni havi eg givið so nógvan stuðul til vælgerandi endamál, at tygum hesa ferð mugu vera nøgdur við smápengan hjá einkjuni.“

„Men kæra frúa,“ svaraði hann, sum savnaði peningin inn, „tað er alt ov mikið. Einkjan, sum tygum tala um, gav alt, sum hon átti sum eina gávu til Guds. Men eg haldi, at tað er alt ov mikið, um tygum vilja geva alt, sum tygum eiga.“

Tað endaði við, at konan gav eina fitta peningaupphædd; men eftir tann dag sammetti hon ongantíð gávur sínar við smápengan hjá einkjuni.

*„Kirkeklokken.“ – Effie Campbell* umsetti.

# Sálmar og sangir

Tað, sum tú vilt, at børn tíni skulu festa rót í og liva av andaliga, skalt tú syngja inn í sinni teirra. Og tú skalt byrja tíðliga. Sangurin hjá mammuni við vøgguna stemmar barnasálina í tí rætta tónalagnum. Tað, sum vit eldru halda vera vert at liva og doyggja uppá, skulu vit syngja inn í sinnið á børnum okkara.

Eg havi í fleiri ár havt eina sálmabók liggjandi á náttborði mínum bæði dag og nátt. Tí havi eg havt stóra gleði av, og eg vil fegin lata hetta lítla heimaráðið fara víðari til onnur.

Eg minnist frá barnaárum mínum, at tá ið tey eldru systkin míni komu heim at vitja sunnudag seinnapart, var tað ein sjálvfylgja, at vit skuldu syngja. So komu sálmabókin og sangbókin hjá Mortani Eskesen niður av hillini, og so sungu vit av heilum huga, hóast eingin okkara dugdi serliga væl at syngja.

Tað er á einum staði, at sálmabókin altíð eigur at liggja, og tað er við sjúkrasongina. Eitt sálmavers kanst tú altíð lesa, og tað hendir, at eitt einstakt vers ella bara ein sálmaregla kann líva ein upp.

*„Et Ord med på Vejen."* – *Effie Campbell* umsetti.

---

## Hvussu er tín andaligi hungur?

*„Mítt hjarta talar til tín: Søkið ásjón mína! Harri, eg søki tína ásjón." Sálm 27,8.*

Um tú hvønn dag brúkar nógvar tímar at hyggja í sjónvarp, og tú ikki kanst finna nakrar minuttir til bøn og bíbliulestur, so hevur tú ein trupulleika við tínum andaliga matarlysti – ein trupulleika, sum krevur títt uppmerksemi. Tað nyttar lítið at eiga einar tríggjar – fýra Bíbliur, og eingin verður latin upp.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

### SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 7. juni | **Tekstur:** | Áps. 9,1-19 | **Bíbliuorð:** | Mark. 16,15 |
| 14. juni | **Tekstur:** | Áps. 16,6-10 + 16-34 | **Bíbliuorð:** | Jes. 45,2a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74